BRÚDLEYP

Í dag kl. 15 giftast í b‡rá›ssalinum í Havn, Heidi Agnarsdóttir Petersen, Tórshavn og Jákup Thomsen, Klaksvík. Veitslan ver›ur hildin í Pálsstovu, Mykinesgøta 7, kl. 19.

Leygardagin 16.12. giftast í Vágs kirkju Anja Mørk og Tom Villy Magnussen, Vágur, Ey›hild Mørk, Vágur og Suni Poulsen, Sumba, Heidi Mørk og André Joensen, Vágur. Vælkomst ver›ur í Vágs høll kl. 19.00.

Tey, i› vilja gle›a brú›arpørini vi› at koma, ver›a vinarliga bi›in um at siga frá á›renn 15.11. á tlf. 373929, 373175, 373193 og 373277.

GULLBRÚDLEYP

Í dag, 28. okt. hava Mása og Jógvan Tróndheim, Klaksvík, gullbrúdleyp. Vælkomst ver›ur í Betesda kl. 18.

Leygardagin 18. nov. kunnu Nelly og Otto Sørensen, Tórshavn halda gullbrúdleyp. Vælkomst ver›ur í Ebenezer kl. 18. Tey, sum vilja gle›a gullbrú›arpari› vi› at koma til veitsluna, ver›a bi›in um at siga frá á›renn 11. nov. á tlf. 318713 ella 315447.

80 ÁR

Mánadagin 30. okt. ver›ur Mina Petersen, Nor›depli, búsitandi í Danmark, 80 ár. Adr. Storkehavevej 4H, 5884 Gudme, tlf. 0045 62252221.

T‡sdagin 31. okt. ver›ur Solgerd Thomasen 80 ár. Tey, i› ynskja at heilsa uppá Golgerd, eru vælkomin inn á gólvi› á Lágargar›i millum kl. 16 og 20.

PRÓGV

Gu›ri› Højgaard, Rituvík hevur tiki› prógv í Cand. Merc. á linjuni Design- & Communication Management vi› Handilsháskúlan í Keypmannahavn og Stockholms Universitet.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 28. okt.: Georg Egholm, tlf. 448016
Sunnudagin 29. okt.: Georg Egholm, tlf. 448016

Nor›oyggjar:
Leygardagin 28. og sunnudagin 29. okt.:
Jaspur Petersen, tlf. 456400

Vágar: tlf. 332413

Su›uroy (nor›ur): tlf. 371560
Su›uroy (su›ur): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Brá›feingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

TILTØK

Gudstænastur

19. sunnudag eftir Trinitatis
Vesturkirkjan: kl. 11, altarg., Heri Joensen
Havnar kirkja: kl. 11, Emil Olsen
Nólsoy: kl. 12, Sonja Klein
Kirkjubøur: kl. 12, Bergur D. Joensen
Tjørnuvík: kl. 12, Marjun Bæk
Kvívík: kl. 12, Martin R. Jacobsen
Hvalvík: kl. 12, Inga P. Dam
Christianskirkjan: kl. 11, altarg., Niels Pauli Danielsen
Kirkja: kl. 12, altarg.,
Hattarvík: kl. 17, altarg., Hans Eiler Hammer
Oyndarfjør›ur: kl. 12, altarg., Jógvan Frí›riksson
Mi›vágur: kl. 12, David Johannesen
Frí›rikskirkjan: kl. 11,
Æ›uvík: kl. 17, Jónsvein Bech
Funningur: kl. 12 messa, Hans J. Joensen, biskupur
Glyvrar: kl. 11, Meinhard Bjartalí›
Hvalba: kl. 12, barnagudstænasta, Ólavur Rasmussen
Øravík: kl. 12.15, altarg., Petur M. Rasmussen
Nor›skála: kl. 12, Uni Næs
Gøta: kl. 12, altarg., Peter O. K. Olofson
Húsavík: kl. 12, altarg., Eva Brinck Jensen

Ebenezer

Sunnudagin kl. 10 Minnismáltí› Harrans, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti, kl. 21 útimøti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

Hvítusunnusamkoman Yviri vi› Strond

Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18 evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Filadelfia, Landavegur 22

Í dag kl. 10, 14 og kl. 20 seminar í læraraskúlahøllini v/ Jens Garnfeldt, í morgin kl. 11 og 18 møti v/ Jens Garnfeldt.
Mánadagin kl. 20 bønarskúlin.

Samkoman Immanuel

Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti.

Meinigheitin í Hoyvík

Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti vi› luttøku úr Soli Deo Gloria í Klaksvík.
Mánakvøldi› kl. 20 bønarmøti hjá Litzie og Ey›finn Lamhauge, Heygsbreyt 2.

KFUM og KFUK í Havn

Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman, Guttorm Zachariasen sigur frá.
T‡sdagin kl. 17 í KFUK: Várgle›i fyri børn.

Meinigheitshúsi› í Havn

Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti vi› Bergi D. Joensen, evni› ver›ur ytrimissión.
Barnaansing er hvørt sunnukvøld, me›an møti› er. Eisini ver›ur pallbor›, har YM-trúbo›arar, foreldur og umbo› fyri eina sendimeinigheit vera vi›. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin kl. 19 er LU-arbei›i›, kl. 20 venur Manskóri› og kl. 21 ver›ur fundur vi› greinarnar í Meinigheitshúsinum um ytrimissión.
T‡skvøldi› ver›ur bíbliutími kl. 20.
Eingin venjing í Meinigheitskórinum mikukvøldi› 1. nov.
Hóskvøldi› ver›ur ungdómsmøti kl. 20.

Frelsunarherurin í Tórshavn

Sunnudagin kl. 11 møti, major Tjåland talar, kl. 13,30 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti, Palli Petersen talar.
Mánadagin kl. 17 skótar.

»Tí› til Gud«

ver›ur í Pállstovu sunnukvøldi› kl. 21. Evni› hesafer›: »Gud Er«. Høgni Johannesen og Jógvan Sk‡lindal skipa fyri.

Rhema á Hálsi

Leygarkvøldi› onki ungdómsmøti vegna felagsmøtini.
Felagsmøtini vi› Jens Garnfeldt byrja fríggjakvøldi› kl. 20 í Læraraskúlahøllini og halda áfram leygardagin kl. 10, 14 og 20 og sunnudagin kl. 11 og 18. Evni: Hvat sigur bíblian um pengar?
Morgunbøn mánadag til fríggjadag kl. 8.30-9.30.
Øll eru vælkomin.

Zion Kollafjør›ur

Ungdómsmøti ver›ur leygarkvøldi› kl. 20. Nógv gott á skránni. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Filadelfia, Sundalagi

Møti ver›ur í Hósvík sunnukvøldi› kl. 18 vi› Dánial Petersen.

Bíbliuskei›rø›in

»yvir evni hin sanni læristveinurin« ver›ur hildin í hølum hjá arbei›arafelagnum Hæddini Saltangará. Møtiskei›rø›in heldur áfram hvønn leygardag kl. 19. Stigtakari og bíblilærari er David Bech.

Missiónsvika í Funningi

Leygardagin kl. 17 barnamøti vi› Regin Høgnesen, kl. 20 møti vi› Alfred Olsen, Hannis Hansen syngur.
Sunnudagin kl. 15 sunnudagsskúli vi› Regin Høgnesen, kl. 18 møti vi› Regin Høgnesen, bólkurin Gittit luttekur vi› sangi. Innsavnan til heimamissiónina.

Missións- og ungdómshúsi› á Glyvrum

Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 19 møti vi› Jacob Højgaard. Øll eru vælkomin.

Glyvra missiónshús

Ísraelsmissiónin: Landsstevnan byrjar í Glyvra Missiónshúsi leygardagin kl. 14. Terje Bakke frá norsku Ísraelsmissiónini talar yvir evni›: Jødar og leyvsalahátí›in. Kl. 16.30 er evni›: Gle›in yvir Guds or›, kl. 20 ver›ur møti, har Terje Bakke talar yvir evni› Ta› livandi vatni›.
Bólkurin Gittit syngur.
Judith og Mejnhardt Hansen grei›a frá arbei›inum í Ísrael.

Ørkin, Saltangará

Møti ver›ur sunnudagin kl. 17 í Arbei›arafelagshúsinum Hæddini í Saltangará vi› David Bech.
T‡sdagin kl. 20 húsmøti hjá Irenu Bech, Skipanes.
Hósdagin kl. 20 bønarmøti.

Missiónshúsi› í Leirvík

Ungdómsmøti ver›ur í kvøld kl. 20 v/Gimma.
Aftaná ver›ur drekka o.a.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafir›i

Leygarkvøldi› kl. 21 opi› hús.
Sunnumorgunin kl. 11 morgunmøti vi› brey›-bróting. Barnamøti kl. 11.
Vit eru vi› í tiltakinum í Havn vi› Jens Garnfelt.

Missiónsvikan í KFUM og K í Klaksvík

Leygardagin kl. 10 kaffi, te og rundstykkir.
Bíbliutími vi› Johannes Mortensen trúbo›ara.
Evni: Bønin-andadráttur teirra kristnu, kl. 19.30 talar Alfred Petersen, bólkurin Bisco syngur.
Sunnudagin kl. 11 gudstænasta vi› altarg., v/Niels Paula Danielsen, kl. 14 familjumøti vi› heimligum kreftum. Barnakóri› í FKUM og &K syngur, kl. 18 Klæmint Tausen talar, Streingjakóri› á Argjum syngur. Høvi› ver›ur at geva eina gávu til Heimamissiónina, kl. 21 eftirmøti vi› sangi og vitnisbur›i.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsi› í Skopun

Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18.30 lovsangsmøti, kl. 19 møti.
Mánadagin kl. 17 barnarbei›i, frá 1. til 6. fl.
T‡skvøldi› kl. 20 møtast ung frá 7. flokki og uppeftir, hjá Arnleyg Hentze.
Filmur ver›ur vístur. Veri› hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsi› á Tvøroyri

Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti vi› Hjørdis og Ednu. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tvøroyrar kirkja

Allahalgannadag 1. nov., ver›ur minningargudstænasta teirra sjólætnu í Tvøroyra kirkju kl. 14. Úr kirkjuni ver›ur fari› út á minnisvar›an á Torvheyggi.

Betel, Vágur

Sunnudagin kl. 11 brey ›-bróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
T‡sdagin kl. 20 ungdómsfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbygg. fundur.

Frelsunarherurin, Vágur

Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti vi› Toril Waag Olsen.
Mánadagin kl. 20 heimaforbundi›.

Missiónshúsi› í Sumba

Møti ver›ur í missiónshúsinum fríggjadagin og leygardagin kl. 20 og sunnudagin kl. 18. Talarar: Niklas Mikkelsen og Petur Magnusson. Øll eru hjartaliga vælkomin.

1000-ára haldi›

Leygardagin 28. okt. kl. 19 ver›ur kirkjukonsert (sálmar) í Skála kirkju.
Sunnudagin 29. okt. kl. 16 ver›ur kirkjukonsert (sálmar) í Glyvra kirkju.
Sunnudagin 29. okt. kl. 19.30 ver›ur kirkjukonsert (sálmar) í Elduvíkar kirkju. Sangur: Petra Iversen
Piano: Stamen Stantchev
Kontrabass: Edvard Nyholm Debess.

Frá Felagnum Pinkubarnadey›i

Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mána›i kl. 14.00 í Jákupsstovu, J. Patursonargøta 24, 100 Tórshavn.
Nærri fæst at vita hjá Annvør Nielsen tlf. 317261, Helle Johansen tlf. 317940 ella Sólger› Foldbo tlf. 422184.

Rey›i Krossur Føroya

Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

Tilhaldi› í Tórsgøtu 21

Opi› er mánadag kl. 10-18. T‡sdag-fríggjadag 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløini eru til taks.
Mánadagur 30.10.
kl. 10-18 Vit hugsa um jólini
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilm. til døgur›an mikud.
T‡sdagur 31.10.
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Frásagnir, søgur, prát og anna›.
Mikudagur 1.11.
kl. 10-13 Matger›. Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgur›i
kl. 14 Túrur
Hósdagur 2.11.
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Fríggjadagur 3.11.
kl. 10-17 Opi› hús
kl. 17 Kvøldseta, skaldinum Jens Paula Heinesen til hei›urs. Havnar Sjónleikarfelag, Lina Larsen og HS-lesibólkurin hava lagt tilrættis. Gestir frá pensjónistaskei›inum á Háskúlanum vera vi›.

Ta› er altí› ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast vi› naka› ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Felagi› Tórshavn gongutúrur

Sunnudagin 29. okt. ver›ur gongutúrur fyri Vestan. Fari› ver›ur av Kunningarstovuni kl. 13.00. Havi› ein drekkamunn vi› og heit og gó› gonguklæ›i. Tilmelding.

Vágs Matmø›rafelag

Dagtilhaldi› í Vági er opi› t‡sdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

VBA-fundir

Fundur fyri vaksin børn hjá alkoholikarum/ella ørkymlandi familjuvi›urskiftum, eru hvørt leygarkvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17 (opin fundur).
Fundirnir eru á Vaskarínum, Tórsgøta 5.

AA-fundir í Havn

Reinsaríi›, Tórsgøta 5: Leygardagin: kl. 17-18.
Sunnudagin: kl. 11-12.

LISA

skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geils-gøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14.00 til 20.00 og annars eftir avtalu á telefon 320197.
Teldu-post-ur lisa@lisa.fo – heima-sí›a www.lisa.fo

Kvinnuhúsi›

svarar alt samdøgri› á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Rá›gevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International Føroya deild

Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.
Frá Felagnum

Føroyskir fiskimenn uttanlands

tlf. 21 04 95.
Felagi› fyri føroyskar fiski-menn í Canada, Svoríki, Danmark, Íslandi og Nor-egi. Lima-gjald 200 kr. um ári›. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

Bahá'í Mi›stø›in í Gundadali

er opin hvørt mikukvøld kl. 20.00.
1., 2., 4. og 5. hvørt mikukvøld: drekkamu›ur, óformelt or›askifti og uppl‡sing um Bahá'í.
3. hvørt mikukvøld: bønarmøti og drekkamu›ur aftaná.
Bahá'í-samfelagi› í Tórshavn

Felagi› Føroyar-Kuba

P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Vi›tala eftir avtalu.

Føroya Astma/Allergifelag

Postadressa MBF-húsi›, Ís-landsvegur 10c.
Felagi› hevur Tlf./fax 311419.

Føroya Felag Móti Krabbameini

Rá›gevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, vi› telefonti› frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

Epileptikarafelag Føroya

Postadr.: MBF-húsi›, Íslandsvegur 10 C. Felagi› hevur ikki fasta skrivstovu-tí›, men samband vi› felagi› fæst á tlf. 313978, Rand-frí› Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

MBF-skrivstovan

Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail: mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin gerandisdagar kl. 8.30-16.00.

Deyvafelag Føroya

Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupost-adr. deaf_fo@-post.-olivant.fo

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

»Og tú mansbarn, sí landar tínir, i› standan undir veggjum og í húsadurum og tala um teg, siga hvør vi› annan: Komi›, latum okkum hoyra, hvat ta› er fyri or›, sum kemur frá Harranum... Og sí, tú ert teimum eins og ein i› kvøur ástarkvæ›i, sum ein, i› hevur vakurt mál, og er kønur í streingjaleiki. Teir l‡›a á or› tíni, men gera ikki eftir teimum.

Ez. 33, v. 30 og 32

Í uml. 1000 ár hevur Guds or› ljó›a› okkara millum. Bæ›i vi› strangleika og mildleika er fólk okkara bo›i› vi› til Gudsríkisgle›ina. Hvussu er vi› okkum, sum nú eru tey, i› hoyra Guds or› og innbjó›ing?

Tí spurningurin er ikki, hvat tær undanfarnu ættirnar hava gjørt vi› innbjó›ingina. Men hvat gera vit vi› hana? Tann spurningin má hvørt ættarli› og hvør einstakur av okkum taka stø›u til. Taka vit vi› henni og gera eftir henni? Ella hóskar myndin frá profetinum, sum vit lósu her eisini til okkara? Fólki› vildi nokk hoyra or›i›, men tey gjørdu ikki eftir tí. Tí var profeturin fyri teimum eins og tann vraka›i kærleikin. Vi› kønum spæli og vakrari rødd syngur hann sítt ástarkvæ›i. Tey l‡›a á, men taka ikki vi› tí.

Men ta› álvarsama er, at ta› er ikki profetin tey vraka, men tann sum hevur sent hann, Gud. Og ta› koma tey sjálvi einafer› at heysta fylgjurnar av. Ein dag skuu tey sanna, at profetur hevur veri› teirra millum. Tí tann lóg er galdandi í Guds ríki, at Guds or› ljó›ar ongantí› tómt okkar amillum. Ta› ger altí› naka› vi› okum. Taka vit vi› tí, virkar ta› frelsu. Avvísa vit tí, virkar ta› dóm.

Gud gevi, at hetta seinasta ikki ver›ur sannleikin um okkum, men at or› hansara má virka ta›, sum er Guds ætlan vi› tí. Ta› veri okkum til frelsu og sælu.

Jónsvein Bech

Títt or› er Gud, várt arvagó›s
Tann arv vit bestan fingu,
Í grøv veit okkum, Gud, ta› rós,
At leidd av tí vit gingu;
Ta› er vár hjálp í ney›,
Vár troyst í lív og dey›.
O, Gud i› hvussu fer,
Lat, me›an verøld er,
Ta› fólks várs arvur vera. (Sb. 305, 4)

Nærvarpi› LUMI radio í Aalborg

Føroyska sendingin »v/ Be-tesdabrunnin« er at hoyra á FM 92,2 MHZ mi›b‡urin, FM 106,5 MHZ Aalborg su›ur, og FM 107,4 Aalborg nor›ur, hvønn leygardag kl. 10.

Evangeliska Røddin

Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tí›, á FM 107,1 MHz.

Føroyska nærvarpi› í Esbjerg

Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11.00 og ver›ur endursend kl. 16.00.

Føroysk møti

Føroysk møti eru tri›ja leygardag í hvørjum mána›i kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamu›ur er aft-aná, øll eru hjartaliga væl-komin.

Føroysk møti í Esbjerg

Sunnudagin 29. kl. 15 ver›ur møti í Zionskirkens sognhus vi› Marin Elisabeth Poulsen.

Føroyska arbei›i› í Eliaskirkjuni

Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í Eliaskirkjuni á Vest-erbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S ste›ga nærhendis. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Ras-mussen, tlf. 32 969995, ella Øssuri Kjølbro, tlf. 36 77 38 20.

FØ‹INGAR

23. september fingu Ann-Mari Joensen, Leirvík og Brian Simonsen, Århus, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og viga›i 2650 gr.

30. september fingu Doris Hjarkhamar og Hjalmar Joensen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og viga›i 4590 gr.

8. okt. fingu Jórun Viderø og Ey›un Nielsen, Søborg, ein son. Hann var 56 cm. langur og viga›i 3950 gr.

9. okt. fingu Maja Højsted og Danny O. Hansen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og viga›i 3600 gr.

17. okt. fingu Janny og Kenneth R. Danielsen, Esbønderup (Græsted DK) ein son. Hann var 57 cm. langur og viga›i 4760 gr.

19. okt. fingu Durita Danielsen og Tórbjørn Sæbú›, Hósvík, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og viga›i 3500 gr.

20. okt. fingu Ingunn Ósk Eiriksdóttir og Heini Weihe, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og viga›i 3100 gr.

21. okt. fingu Charlotta og Líggjas Joensen, Toftir, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og viga›i 3425 gr.

21. okt. fingu Súsanna og Jógvan Andrias Debes, Rituvík, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og viga›i 3900 gr.

21. okt. fingu Paula og Villads Bøgesvang, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og viga›i 3800 gr.

22. okt. fingu Mai Prior og John Johansen, Mi›vágur, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og viga›i 3350 gr.

23. okt. fingu Beinta og Petur Amon Dalbø, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og viga›i 3700 gr.

25. okt. fingu Turid og Petur Hans Hansen, Toftir, ein son. Hann var 56 cm. langur og viga›i 4550 gr.

26. okt. fingu Kala Rajani og Rúni M. Hansen, Saltangará, ein son. Hann var 54 cm. langur og viga›i 3700 gr.

23. september fingu Ann-Mari Joensen, Leirvík og Brian Simonsen, Århus eina dóttur. Hon var 49 cm. long og viga›i 2650 gr.

ANDLÁT

19.10.00
Linvold Heinesen, Sandavágur, 97 ár.
20.10.00
Arni Frits Jacobsen, Fuglafjør›ur ætta›ur úr Sandvík, 71 ár.
Herman Dahl, Klaksvík, 64 ár.
Oluffa Jensen, Luffa í Gongini, 88 ár.
Petra Michelsen, Tórshavn, 70 ár.
21.10.00
Ingibjørg Poulsen, fødd Samuelsen, Tórshavn.
22.10.00
Maria Oknadal, Skopun, 82 ár.
23.10.00
Mathilda Dam, Kunoy, 91 ár.
24.10.00
Hilma Jensen, búsitandi í Havn, 77 ár.
25.10.00
Jákup Andreas Joensen, vanliga nevndur Diaba, úr Klaksvík, 86 ár.